# Cheney abbi

Amerikanski varaforsetin, Dick Cheney, er vorðin abbi, eftir at dóttir hansara Mary hevur fingið ein son. Tað óvanliga við hesum er, at tann 38 ára gamla Mary er lesbisk og hevur í mong ár livað saman við einari kvinnu. Mary átti sonin á einum sjúkrahúsi í Washington fyrradagin, og sambært amerikonskum fjølmiðlum hava abbin og omman verið og vitjað tey bæði. Varaforsetin er annars kendur fyri at halda fast um konservativ, kristin virðir.



*Mortan Johannesen var ein túr suður úr Kirkjubønesi við snellu í vikuni. Hann royndi á vestfallskyrrindum, og veiðan hesa løtu var 150 pund. Á myndini vísir útróðrarmaðurin, hvussu smáur fiskurin er – og hann gerst alsamt smærri og smærri*

*Mynd: Jan Muller*

# Skelkandi smáur

**- Hetta er ein syndarlig gongd. Tað er avgerandi neyðugt, at útróðrarbátarnir, sum royna við línu, fara út um tríggjar fjórðingar. Annars endar heilt galð við toskinum, sigur Mortan Johannesen, sum roynir við snellu við bátinum Tvíburðar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mortan Johannesen, sum í nógv ár var trolaraskipari, alari og virkiseigari, hevur seinastu árini verið útróðrarmaður. Hann eigur glastrevjabátin Tvíburðar og roynir burtur av við snellu.

Hann stúrur álvarsliga fyri gongdini við toskinum, nú fiskurin bara gerst smærri og smærri, sum tíðin gongur.

- Umframt at eg sjálvur eri útróðrarmaður, fylgi eg rímiliga væl við, hvat fer fram við bryggjukantin.

Mortan sigur, at tað sindrið av toski, sum fæst fram við landi og úti á, er so smáttfallandi, at tað er ræðandi.

- Eg haldi, at gongdin er skelkandi. Fiskurin gerst smærri og smærri og tað, sum fæst á góðum leiðum í dag, er so elendiga smátt, at tað næstan ikki er orð fyri tí.

Útróðrarmaðurin heldur ongan iva vera um, hvør orsøkin er til negativu og skelkandi gongdina, sum hann rópar hana.

- Útróðrarbátarnir, sum royna við línu, eru so ógvuliga nógvir í tali, og teir royna heilt inn í klettin. Hetta er nakað, sum má halda uppat. Eingin verður fegnari um, at bátarnir noyðast longur út enn línumenninir sjálvir, tí hetta kemur í longdini eisini at geva teimum eitt betri grundarlag.

Mortan heldur, at hugsunarháttурin millum útróðrarmenninar, sum royna við línu, er, at tá ið aðrir seta í klettin, so geri eg tað eisini, sum hann tekur til.

- Tað er ein sannroynd, at glastrevjabátarnir, sum royna við línu í dag, eru líka so effektivir og seta og draga líka nógva línu, sum teir gomlu línubátarnir við 27 monnum gjørdu í sekstiárunum.

Hann vísir á, at fiskurin at síggja til er hampiliga væl fyri til fiti, men hann er kortini ikki av tí feitasta.

- Fitin er ikki trupulleikin í løtuni. Tað er royndin við línu her inni á leiðunum, sum er alt ov stór, og eg stúri fyri, at hetta endar í einum »forskrekkilsi«, um myndugleikarnir, sum sita við avgerðunum, ikki taka sær annað skinn um bak og fáa smærri útróðrarførini við línu út um tríggjar fjórðingar, sigur Mortan Johannesen, ið vit fara at venda aftur til í eini aðrari grein.

Starvslýsing

Heimatænastan

**Endurlýsing:**

## Ergoterapeutur til Heimatænastuna Vágar / Norðurstreymoy

Í samband við at økisterapi verður sett í verk í Heimatænastuni øki 2, verður søkt eftir ergoterapeuti til setan 1. august 2007 ella eftir nærri avtalu. Talan er um eitt fulltíðarstarv.

Ergoterapeuturin og fysioterapeuturin í økinum fara at samstarva um uppgávurnar.
Tilboðið skal skipast og mennast í tøttum samstarvi við økisleiðsluna, aðrar starvsbólkar og samstarvsfelagar, sum hava týdning fyri einstaka brúkaran.
Arbeiðið hjá økisterapeutunum verður at veita tænastur til fólk við tørvi á uppvenjing og viðlíkahaldi av førleika.
Tænastan verður veitt til fólk yvir 18 ár, ið búgva heima, á eldrasambýlunum og á røktarheiminum.
Talan er um eitt nýtt tilboð við støði í einstaka brúkaranum, soleiðis at brúkarin fær eitt heildartilboð.

**Í mun til brúkarin skal økisterapeuturin:**
- Meta um førleika og tørv á tiltøkum
- Veita ADL- og funktiónsvenjing
- Veita venjing/viðgerð, uppafturvenjing og viðlíkahaldsvenjing til brúkaran
- Veita vegleiðing og undirvísing til starvsfólk og avvarðandi í mun til viðlíkahaldsvenjing hjá brúkaranum
- Veita ergonomiska vegleiðing, undirvísing og ráðgeving til starvsfólk og avvarðandi
- Gera fyrireikandi og uppfylgjandi arbeiði í samband við útskrivan frá sjúkrahúsi
- Viðvirka við meting, útvegan og nýtslu av hjálpitólum, húsabroytingum v.m.

**Vit sóknast eftir starvsfólki, sum:**
- Hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- Er ígongdsetari og torir at ganga nýggjar leiðir
- Dugir væl at samstarva og samskifta
- Er fleksibul og opin fyri nýggjum avbjóðingum
- Hevur telduførleika á brúkarastøði

**Vit bjóða:**
- Eitt nýtt starv við nógvum avbjóðingum
- Eitt starv við tvørfakligum samstarvi á einum arbeiðsplássi í støðugari menning

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Terapeautarnir hava beinleiðis tilvísing til økisleiðaran. Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er í løtuni HeimatænastanVágar/Norðurstreymoy. Arbeiðsstaðurin er við útgangsstøði frá Røktarheiminum á Mørkini.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara, á tlf. 333249 / 282249.

**Umsókn:**
Send eina umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum til:

Heimatænastan Vágar/Norðurstreymoy
Økisskrivstovan, Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 15. juni 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**

Lesið Sosialin -so eru tit við!

